# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fyrsta røðan

Løgmansrøðan í gjár er sjálvsagt áhugaverd bæði tí, at hon er fyrsta røða hjá Kaj Leo Johannsesn og tí, at samfelagsligu umstøðurnar eru sum tær eru við tað, at heimsfevnandi fíggjar- og búskaparkreppan nú eisini av álvara er farin at bera við í Føroyum.

Røðan er sum sagt ikki sørt áhugaverd og nakað øðrvísið eitt nú við, at tað liggur ein framligur og glaðlyntur, mestum skótakendur dámur yvir tekstinum: Kreppan er ein avbjóðing, men vit fara sjalvsagt at megna hesa við at standa saman eitt nú tí "tað finst ein megi, sum bindur okkum tættari saman, enn vit ofta gáa um, og tann megin býr í okkara hjørtum. Kærleikin til landið, tilknýtið til mentanina og tilvitanin um stríðið fyri at yvirliva á hesum oyggjum býr undir øllum, vit gera og er."

Hartil hava vit vakstrarpakkan, sum longu er almannakunngjørdur og sum fer at økja um BTÚ við 1,3% í 2010 og 2% í 2011. Pakkin, sum nú ikki longur eitur kreppupakkin men Vakstra- og bygnaðarpakkin, fevnir um trý lið: virksemisskapandi átøk, sum skulu skapa arbeiði, rationaliseringar, sum skulu tryggja ein sunnan og skynsaman rakstur av okkara samfelagi og bygnaðarbroytingar, sum tryggja ein sterkan og støðugan búskap sum frá líður.

Jú víst er hetta er bjartskygd tala og einki er at ivast í, at fólkinum tørvar bjartskygda talu í hesum døgum. Tað er eisini vanligt at statsmenn appelera til felagskap og samanhald í krepputíðum. Vit skulu bera byrðarnar í felag, lat so vera, at tær herðar, sum bera skulu eru ymiskar til breidd og styrki.

Tað er einki at ivast í, at Vakstrar- og keppupakkin fer at sera sín dám og politiska lívið hetta komandi árið. Um virksemisskapandi titøkini er stutt at siga, at tey longu eru samtykt og tí er sum so einki nýtt í teimum. Ein týðandi partur, nevniliga bankapakkarnir og útflutningskredittturin eru komin úr Danmark og kann serstakliga hesin partur fáa stóran týdning í eini tíð, hvar peningastovnarnir eru afturhaldandi við rakstrarfígging. Politiskt eru útflutingskrediturin áhugaverdur, tí hann er eitt slag av umvendari yvirtøku.

Tað er lítið at ivast í, at tað eru rationaliseringarnar og bygnaðarbroytingarnar í pakkanum, sum hava størsta áhugan í samgonguni. Alt bendir á, at ABC flokkarnir ætla at nýta høvið, sum kreppan gevur, at fremja nakrar tillagingar innan almenna sektorin, sum annars ikki lata seg fremja í vanligum tíðum. So vil tíðin vísa, hvørt hesir partar av pakkanum fyri tað fyrsta lata seg fremja og fyri tað annað, um teir gagna búskapinum, um teir lata seg fremja í verki. Tað verður ikki lætt politiskt, tí hesar rationaliseringar og tillagingar, so tiltrongdar tær ivaleyst eru, fara at ganga hart út yvir serstakliga veljarar Javnaðarfloksins, sum sostatt kann gerast tann flokkur, sum kemur at rinda hægsta prísin fyri pakkan. Livst so spyrst, men okkurt kundi longu nú bent á, at pakkin verður ikki samtyktur í óbroyttum líki. Samantikið er nógv áhugvert og ikki sørt nýtt í røðuni, og fara vit tí at venda aftur her við viðmerkingum til partar av fyrstu løgmansrøðu Kaj Leo Johannessens.

**Sosialurin**

## Góðu tingmenn og -kvinnur

Viðvíkjandi støðuni hjá føroyskari handverksvinnu sum heild.

Nú má leggjast á annan bógv. Sum snikkaravirki her í Føroyum, versna virkisumstøðurnar støðugt. Tað seinasta átakið til bana fyri føroyskum handverki er, nú sokallaður "Ólavsøkupakkin". Uppskotið um at taka stuðulin av MVG'num uppá arbeiðslønina til húsabygging, ger at støðan gerst verri, enn hon er frammanundan. Sum er, eru vit ikki kappingarførir við útlendskt handverk, tí vit heilt einfalt ikki starva undir somu treytum, her hugsa vit um MVG á rávøru, høgan orkuprís, langt/dýrt á aðrar marknaðir, ongan exportstuðul/garanti.

Eitt er at skapa eitt samfelag, sum ideologiskt/teoretiskt er eftir ein ella øðrum leisti, men tað nyttar einki, um avleiðingin er, at vit allir mugu uppá ALS.

So, sum støðan er nú, vilja vit heita á tykkum, at seta verjutoll á útlendskt handverkaraarbeiði, so leingi sum tit ikki vita, hvørjar vinnur vert er at satsa uppá her á landi. Ella okkurt annað, so sum skattalætta ella flutningsstuðul, ella tollfría rávøru.

Tí eitt er greitt, at føroyskur vinnupolitikkur í dag bert snýr seg um eitt, og tað er, hvussu tað siglandi fólki hevur tað. Hesar vinnur hava altíð havt óbetingaðan stuðul, bæði moralskt og peningaligt, lat okkum í fleng nevna skattalætta til sjómenn, DIS og FAS, flutningsstuðul mvg fría orku, ongi avgjøld v.m. Føroya Løgting/Landsstýrið heldur at hetta er einasti vinnuvegur føroyingar makta.

Tíbetur eru aðrir førleikar enn sjómannskapur millum fólk her á landi, men at tað almenna Føroyar sær nakra nyttu í hesum, er ilt at síggja.

Í Føroyum hava vit eina langa og góða handverkstradition. Tað er við sorg, at ein sær hesa vinnu verða fyri einum bakkasti fyri og øðrum eftir. Skipasmíð er søga, tá landið skal hava skip verður heldur fari til útlendskar studningsskipasmiðjur at byggja. Avleiðingin er kanska eitt sindur bíligari skip, men aðrar avleiðingar eru at allir pengarnir fara av landinum, uttan at koma í umfar nakrar ferðir afturat. Og føroyskir sveisarar eru eisini søga….

Sama ger seg galdandi við snikkara virksemi, vit verða oyst undir við vindeygum, trappum framleidd á virkjum sum eru smekkaði upp við "iværksætterstøtte, EU-regionalstøtte", o.s.fr., sum framleiða til export við exportstøtte/garanti. Og sum slettist ikki kunna samanlíknast við okkara handverk í dygd!

Verðin er soleiðis skrúað saman, at ein og hvør er sær sjálvum næstur, og hetta er eisini galdandi innan fyri politikk. EU og USA áseta verjutoll, innføra studning hvørjaferð ein vinna er hótt hjá teimum, sjálvt um hesi stórveldi ideologiskt eru fyri fríhandli, og arbeiða fyri at fáa øll verðins lond at starva innan karmarnar hjá WTO.

Samanumtikið forvænta vit, at føroyskir politikarir fáa beinini niður á aftur á jørðina, og finna út av at skapa karmar fyri, at føroysk vinna sum heild kann mennast á somu kappingarføru treytum, sum í restini av heiminum.

*Við handverkskvøðu*

**P/F Træsmiðjan G.L.T.**

## Tunnilssøla í Fuglafirði - enn einaferð

**JÓHAN HERI JOENSEN**

Fyrst vil eg takka Sigurd Simonsen borgarstjóra, fyri rættleiðingina hann hevði til mítt lesaraskriv. Tað er at fegnast um, at hol nú er komið á ballónina, og ein kunning umsíður lekur út til allar borgarar. Vit kunnu nú síggja málið frá einum øðrum sjónarvinkli – kritikkurin frá mínari síðu fær nú mótspæl - tað er bara gott, at so er.

Byrjað verður við at vísa á §1,2 petti í fundarskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, sum sigur, at keyp og søla av føstum ognum skal fara fram fyri afturlatnum hurðum.Til tað má eg siga, at tað ongantíð hevur verið uppá tal frá mínari síðu, at fáa annað fram enn tað sum eftir lógini longu er alment. Frá polittiskari síðu vóru ikki "stundir" til hesa kunning, samstundis sum keyparin, í sølutilgongdini, hevur fulla "innsidevitan". Satt at siga, so havi eg ilt við at skilja, hví bert annar parturin má fáa kunning.

Eg verið eisini lagdur undir at ørkymla borgarar og landsmynduleikar við mínum kritikki. Tí sigur Sigurd seg nú verða noyddan at geva borgarunum eina kunning. - Havast má í huga, at keypararnir í forvegin hava fulla "innsidevitan" – men borgarin má ikki kunnast um tað sum í dag longu er alment atkomuligt. Jú, tað ræður um at halda kortunum tætt at kroppinum – einki má lekast út (skeiva vegin).

Nei, Sigurd, tað sum verðuliga ørkymlar er, at polittikararnir ikki vilja spæla við opnum kortum.

Eftir henda innleidning fáa vit rein tøl á borðið – takk skalt tú hava fyri tað.

Fyrst, søla av tunnilsgróti fyri 11,9 mill kr. - fyri 20 árum síðani. Hetta grót varð nýtt til ífyllu av Tunnilsbryggjuni, sum var ein neyðugur liður í útbyggingini, um tunnlarnir skuldu kunna nýtast. Satt at siga, virkuliga genialt, at nýta hesa grundgeving, sum mótrokning, í einari dumpingsølu. Men lat okkum skera út í papp: Seljarin var Fuglafjarðar kommuna, keyparin var eisini Fuglafjarðar kommuna.

Síðani inngjald frá Havsbrún og Bergfrost 20,4 mill. kr. Hesin peningur verður roknaður sum

*Framhald á næstu síðu*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.